

*– Tað átti at verið ein fyrimunur, at ungdómurin nemir sær útbúgving. Men tað ikki tænir landinum, kemur lærda fólkið ikki heim aftur, sigur Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum*

## FAKTA

Sambært hagtølunum, sum Norðuratlantsbólkurin hevur fingið til vega frá Danmark Statistik, búgva í alt 22.549 føroyingar, býttir yvir 3 ættarlið, í Danmark.
Í 1. ættarliðunum er býtið millum kynini ógvuliga ójavnt, av 7.737 fólkum er ein meiriluti á 1.799 konufólk. Øll trý ættarliðini hava tó til felags, at aldursbólkarnir 25-39 ár og 7-16 eru størstir. Hetta er felags fyri bæði kyn.

# nú!

gongd til arbeiðsmegi. Men vit eru í tí óhepnu støðu, at onki arbeiðsloysi er, samstundis sum fólkatalið er støðugt. Hetta rakar bæði vinnuna og almenna sektorin, har ilt er at finna skikkaða arbeiðsmegi - bæði faklærda og ófaklærda.

- Trupulleikin er kanska, at landið er ikki nóg attraktivt hjá fólki at flyta heim aftur til. Og eftir øllum at døma er hetta serliga galdandi fyri kvinnurnar, sigur Marita Rasmussen.

### Universitet sum skjótast

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur skrivað tvey álit um gransking og útbúgving. Har er ongin ivi um, at hetta er mest týðandi satsingin fyri framtíðina. Bæði um landið skal standa seg í altjóða kappingini, og fyri at venda óhepnu gongdini viðvíkjandi fólkatalinum og kynsbýtinum.

- Vit mugu fáa eitt ordiligt universitet sum skjótast. Og so skal peningur setast av til eitt nú ph.d. gransking, so vit fáa eitt ordiligt granskingarumhvørvi, sigur Marita Rasmussen. Í hesum sambandi heldur hon tað vera alneyðugt, at føroyingar kunnu nema sær í øllum førum partar av hægri útbúgvingum her á landi.

– Vegurin fram er útbúna fólkið. Vit rokna við, at tey fáa sær eina útbúgving, men í løtuni er vandin, at tey koma ikki heim aftur eftir loknan lestur, millum annað tí tey kunnu ikki menna seg víðari her heima, sigur Marita Rasmussen.

### Vinnan medábyrgd

Sambært nýsetta stjóranum í Vinnuhúsinum hevur vinnan eisini ábyrgd av at bjóða seg fram í sambandi við granskingarverkætlanir og at hava starvsvenjingarpláss til tey lesandi.

- Vinnan eigur eisini at vera meira aktiv í rekrutteringini av arbeiðsmegi til Føroyar. Í løtuni hendir tað, at størv verða lýst leys, men at ongin søkir tey, og tí lækka krøvini eisini. Fyritøkurnar skulu tí gera nógv meira fyri at marknaðarføra seg og at skapa spennandi umhvørvi og avbjóðingar til fólk við útbúgving, greiðir Marita Rasmussen frá.

### Livandi lestrarumhvørvi

Hon sigur, at eitt livandi lestrarumhvørvi við næmingum og lærarum, bæði úr Føroyum og útlandinum, hevur nógv annað gott við sær fyri landið.

- Í býum við lesandi ungdómi er eisini grundarlag fyri einum livandi umhvørvi við nógvum nýggjum arbeiðsplássum og tilboðum av ymsum slag, sigur Marita Rasmussen, sum heldur tað vera eina politiska avbjóðing at skapa fortreytirnar fyri einum sonnum vitanarsamfelag, har lærdi ungdómurin trívist og velur at búseta seg við maka og børnum.

Og hon vísir á, at tørvur er á einum kjaki í fólkinum um hetta. Síðani skulu pengar og orka raðfestast politiskt. Og vit mugu gera okkum greitt hvørjar útbúgvingar og hvørji granskingarstørv vit vilja hava. Og síðani eisini eitt gott grundstykki og høli til virksemið.

### Er ikki ein útreiðsla

At verandi karmar um lestrarumhvørvið í Føroyum er so vánaligir, heldur hon lítið um.

- Ongin ivi er um, at vit eiga at hava virðiligar karmar. Og hetta er ikki ein spurningurin um at brúka meira pengar, men at brúka teir øðrvísi. Vit hava raðfest vegakervið, brúgvar og tunlar og tað hevur havt avgerandi týdning fyri vinnuna. Men nú mugu vit raðfesta granskingina, sigur hon, og endar við hesum orðum:

- Tað átti at verið ein fyrimunur, at ungdómurin nemir sær útbúgving. Men beint nú beri eg ótta fyri, at vit eru um at enda við braindrain av ringasta slag, eins og í Hetlandi, har lítil vón er eftir.

| TALVA 2: DØMI UM ÚTBÚGVINGAR (01.01.2006) | |
|---|---|
| Almanna- og heilsuhjálparar/assistentar | 720 |
| Sjúkrarøktarfrøðingar | 410 |
| Námsfrøðingar | 405 |
| Fólkaskúlalærarar | 237 |
| Maskinmeistarar | 97 |
| Skipsførarar | 71 |
| Búskaparfrøðingar | 29 |
| Løgfrøðingar | 60 |
| Vinnubúskapur og leiðsla | 88 |
| Tannlæknar | 17 |
| Læknar | 90 |
| Farmaseutar | 19 |

*Viðmerkjast skal, at hesi fólk í høvuðsheitum eru at finna í 1. og 2. ættarliði av útisetum.*

## FAKTA

Nettotilflytingin av føroyskum konufólki til Danmarkar er nógv størri enn av mannfólki. Árinini av hesum síggjast í Føroyum í dag, har fólkatalið er merkt av ójavnvág millum kynini.

*(Kelda: Hagstova Føroya)*

*Soleiðis eru føroysku útisetarnir í Danmark útbúnir*

*(Kelda: Norðuratlantsbólkurin)*

# Útbúgva fólkið av landinum

**Meðan vinnan rópar eftir ófaklærdari arbeiðsmegi, er veruligi trupulleikin, at ongi størv eru til tey vælútbúnu at koma heim aftur til. Hetta er bestemt ikki gott, um vit vilja vera partur av globaliseringini, sigur Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur**

FÓLKATROT
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Skeiklað fólkasamanseting og avoldaður vinnubygnaðurin eru millum størstu avbjóðingarnar her á landi. Meðan fólkatalið hevur verið ræðandi støðugt seinastu mongu árini og 2000 kvinnur í bestu árum eru í undirskoti í Føroyum, áttu allar ávaringarklokkur at ringt – bæði politiskt og hjá vinnuni sjálvari.

Hetta heldur Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, sum er púra samdur við Jákup á Dul Jacobsen, føroyskum vinnulívsmanni í Íslandi, sum við Rás2 segði, at tað er ein ovurhondsstórur trupulleiki fyri Føroyar, at fólkatalið stendur í stað, og at so stórur ójavni er millum kynini í burðardyggum aldri.

Jógvan Mørkøre heldur, at nú so nógv verður talað um útboð og eftirspurning av arbeiðsmegi, eiga vit fremst av øllum at gera okkum greitt, hvat tað er fyri eitt samfelag vit vilja hava. Í hansara hugaheimi er ikki nógvur ivi: Vit eiga at byggja upp eitt vitanarsamfelag, sum skal virka í einum globaliseraðum heimi. Men hetta samsvarar ikki serliga væl við, at tað júst eru tey vælútbúnu, sum ikki koma heim aftur eftir loknan lestur.

### Skeivt fokus

Jógvan Mørkøre sigur, at av tí at fiskivinnan hevur so ilt við at fáa fólk í ófaklærdu størvini, so verður bert fokuserað uppá at fáa meira ófaklærda arbeiðsmegi til landið.

- Í staðin áttu vinnan og tað almenna at fokusera upp á eina víðfevnda umskipan av vinnustrukturinum, so hon lagar seg til høgu útbúgvingarnar, sum føroyingar nema sær burtur í heimi, sigur Jógvan Mørkøre. Hann heldur lítið perspektiv vera í at útbyggja ein nýggjan undirklassa við ófaklærdum.

- Við ófaklærdari arbeiðsmegi fært tú onki vitanarsamfelag, og tað er sum um, at vinnan bara fokuserar uppá at fáa ófaklærda arbeiðsmegi at átaka sær hesi bráfeingis størvini í fiskivinnuni, alt meðan tað ikki eru tey, sum leiða tjóðina inn í vitanarsamfelagið.

Samfelagsfrøðingurin heldur tað vera løgið, at vit heldur innflyta slíka arbeiðsmegi, í staðin fyri at útflyta arbeiðsplássini, eins og gjørt verður í øðrum fiskivinnutjóðum kring heimin.

### Útbúgva til útlandið

Jógvan Mørkøre vísir á, at har er ein stórur bólkur av vælútbúnum útisetum, sum ikki koma heim aftur, tí her snøgt sagt ikki er arbeiði til teirra. Tí heldur hann tíðina vera búna til, at vit endurskoða allan vinnupolitikkin, og at lítið høpi er í at tosa um gransking og menning og at fyrireika okkum til vitanarsamfelagið, um vit ikki taka hesa avbjóðing í størri álvara.

Hann vísir á, at talan er um ein rættiliga kompleksan trupulleika, og at neyðugt er, at onkur veruliga fer inn við pengum og orku, vilja vit hava eitt veruligt vitanar- og granskingarumhvørvi í Føroyum.

- Í mun til altjóða granskingarumhvørvi er føroysk vinna alt ov smøl at bera einari veruligari gransking. Tí útbúgva vit í løtuni fólk út úr landinum. Samstundis fylgir bygnaðurin á arbeiðsmarknaðinum og í vinnuni als ikki við í veruleikanum, tí fólk koma ikki heim aftur at arbeiða á flakavirkjum, sigur Jógvan Mørkøre.

| Samanlagt fyri 18-64 ára gomul | | |
|---|---|---|
| Tann 01.01.2007 | | |
| Mannfólk | Konufólk | Íalt |
| 15.237 | 13.229 | 28.466 |

*Talva yvir talið á kvinnum og monnum í vinnuførum aldri* *(Kelda: Hagstova Føroya)*



*Jógvan Mørkøre heldur, at tíðin er búgvin til at endurskoða allan vinnustrukturin. – Vit eiga at byggja upp eitt vitanarsamfelag, sum skal virka í einum globaliseraðum heimi, sigur hann*

### Opinleiki báðar vegir

Hann tekur soleiðis til, at tað er lítið perspektiv í at útflyta børnini og at innflyta fremmanda arbeiðsmegi, sum enn ikki sleppur at búseta seg í landinum og kanska á tann hátt kann vera við til at byggja land.

- Hóast vit sjálvandi skulu vera opin fyri tí fremmanda, tolsemi og alt hatta har, so er tað samstundis í ósamsvar við veruleikan her á landi. Tí við opinleikanum liggur eisini ein hugburður um, at vit skulu eggja ungdóminum at nema sær útbúgving, sigur Jógvan Mørkøre.

- Og tað eru hesi, sum skulu lyfta okkum inn í beinhørðu vitanargrundaðu kappingina í globalu framtíðini, staðfestir Jógvan Mørkøre.

### Kvinnurnar mangla

Í mun til spurningin um stóra undirskotið á kvinnum, sigur hann, at hetta bert undirstrikar trupulleikan, tí tað eru kvinnurnar, sum standa fyri reproduktiónini, og traditionelt átaka sær tær alt fleiri røktaruppgávurnar í modernaða samfelagnum.

- Støðuga fólkatalið og konufólkatrotið er ein uppgáva, sum eigur at verða loyst av tí privata og tí almenna í felag. Tí hvussu fáa vit talið av kvinnum í burðardygga aldrinum upp, og hvussu fáa vit tey vælútbúnu fólkini heim aftur eftir loknan lestur?